


Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin -tað loysir seg

i Sosialurin

Les í býin hvønn hósdag !

# Borurin nærkast týðandi máli

OLJULEITING
*Jan Müller*

Tað gongur væl at bora hjá Amerada Hess samtakinum, men enn hevur Sovereign Explorer ikki gjørt nakað oljufund. Sosialurin skilur, at tað longu eru boraðir meira enn 3000 metrar og eftir resta einir 800 metrar. Boringin er gingin skjótari enn væntað tvs. at har hava ikki verið trupulleikar við basalti ella øðrum. Høvuðsmálið hjá Hess nærkast í hvørjum Gongur sum nú verður borurin frammi á einum av teimum mest týðandi høvuðsmálunum einaferð í næstu viku. Tað frættist, at kjarnur eru tiknar upp men einki frættist um úrslitið av hesum kjarnuroyndum. Eftir tí sum skilst í oljuverðini hevur boringin enn ikki havt við sær nakað sum líkist einum fundi. Men tað er so heldur ikki í andsøgn til vónirnar at finna olju, tí tær snúgva seg serstakliga um endaliga málið umleið 3800 metrar niðri í undirgrundini.

Gitingar eru tó um einstøk oljuspor, men tað fáa vit ikki váttað. Okkurt bendir tó á, at eisini í hesi triðju boringini við Føroyar eru staðfest oljuspor. Men tað er tó ikki nóg mikið til at geva vónir um verulig oljufund. Tað mugu vit so bíða eftir í hvussu er nakrar dagar aftrat. Boringin byrjaði 20. september, so í morgin er ein mánaði farin. Helst verður boringin liðug nakað fyrr enn mett tvs. umleið 1. november.



Í Býin - hvønn hósdag

